## Landsskattakærunevndaravgerð

**Mál nr. 05/1992**

**Fríur bilur,**

**Skattgjaldari kært um, at skattskylduga inntøkan er hækkað við virðinum av fríum bili.**

Grannskoðari hevur vegna skattgjaldara kært um, at hann fyri árið 1989 er settur í skatt av virðinum av fríum bili frá arbeiðsgevara.

Skattskylduga inntøkan fyri 1989 er hækkað við kr. 18.000 frá kr. 270.100 til kr. 288.100. Bygdaráð boðar undir høvuðsálíkningini fyri 1989 kæraranum frá, at ætlanin er at hækka

inntøku hansara við virðinum av fríum bili, og vísir til heimildina í § 25 í skattalógini.

Skattgjaldarin kærir avgerðina hjá kommununi og viðmerkir, at hann hevur privatan persónbil, sum hann rindar allar útreiðslur av sjálvur, og at orsøkin til at hann hevur bilin hjá arbeiðsgevaranum, er tann, at hann við hesum bili (lítil lastvognur), sum arbeiðsformaður alt árið 1989 koyrdi til arbeiðsplássið og hevði arbeiðsfólk við báðar vegir.

Deildin svarar so aftur og sigur, at koyringin til og frá arbeiðsstaði er at rokna sum privatkoyring, og at við arbeiðsstað er at skilja tað staðið, har arbeiðið verður gjørt, sum treytar lønina. Kæran verður sostatt ikki gingin á møti. Kært verður so til landsskattanevndina.

Kærarin greiðir frá, at hann er arbeiðsformaður hjá partafelag. Hann hevur egnan privatbil. Hann arbeiddi á arbeiðsplássinum á millumbylgjusendaran hjá útvarpinum alt árið 1989. Hvønn morgun fóru tríggir bilar hjá partafelagnum til arbeiðsplássið við arbeiðsfólki, ein fór úr heimbygdini hjá skattgjaldaranum, ein annar úr eini aðrari bygd og ein triði úr eini triðju bygd. Kærarin koyrdi tann bilin, sum fór úr fyrstu bygdini. Menninir fingu løn frá teir fóru í bilin.

Kærarin førir annars fram, at hann ikki kann roknast at hava frían bil, tá hann av felagnum varð álagdur at nýta bilin at koyra seg sjálvan og annað arbeiðsfólk til arbeiðsplássið.

Kæran er send kommununi, og sigur kommunan í frágreiðing síni,

*- at bilurin stendur heima við hús hjá skattgjaldaranum,*

*- at bilurin annars verður nýttur privat og*

*- at hon er vitandi um, at kærarin hevur ein privatbil, men at tað er konan, sum mest nýtir persónbilin.*

Ráðið vil geva kæraranum viðhald í, at koyringin frá heimbygdini til arbeiðsstaðið saman við arbeiðsfólki er ikki at rokna sum privatkoyring, tá menninir fáa løn frá teir fara í bilin.

Arbeiðið hjá teimum byrjar tí, tá teir fara í bilin, og er koyringin tá at rokna sum koyring í arbeiðstíðini í bili arbeiðsgevarans.

Hinvegin metir ráðið, at rætt er, at kærarin skal skatta av virðinum av fríum bili frá arbeiðsgevara, tá kommunan, sum omanfyri nevnt er vitandi um, at hesin bilurin verður nýttur privat av skattgjaldaranum eftir arbeiðstíð.

Ráðið styðjar seg í hesi niðurstøðu til § 25, 4. stk, sum sigur:

- *at til skattskyldugu inntøkuna verður roknaður rætturin til ókeypis nýtslu av fastogn ella leysafæ o.t.,* t.v.s. til dømis av bili frá arbeiðsgevara.

Ráðið fer tí at mæla nevndini til at staðfesta avgerðina hjá kommununi um, at kærarin skal setast í skatt fyri 1989 av virðinum av fríum bili frá arbeiðsgevaranum.

**Landsskattanevndin hevur síðani havt málið til viðgerðar á fundi og kom til ta niðurstøðu, at tað í hesum føri ikki kann vera rætt at skatta kæraran av virðinum av fríum bili, tí bilurin er allan dagin í nýtslu hjá arbeiðsgevaranum, frá tí hann á morgni fer úr heimbygdini, og til hann um kvøldið er aftur í heimbygdini, og afturat hesum kemur, at kærarin sjálvur eigur persónbil, sum hann má metast at nýta uttan fyri arbeiðstíð sína, tá bilurin hjá arbeiðsgevaranum ikki kann haldast vera egnaður til verunliga privata koyring.**